# Flyta 16 milliónir úr Havn

**LOKALPOLITIKKUR** Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur nú strikað ætlanini at byggja íbúðir til sinnisveik í Havnini. Ístaðin skal íløgan upp á 16,2 milliónir flytast vestur í hennara egnu heimbygd, Sandavág

Áki Bertholdsen

Ætlanin at byggja 16 íbúðir í Havnini til sinnisveik, er nú slept.

Tað hevur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, nú tikið avgerð um.

Í staðin fyri skulu hesar íbúðirnar nú byggjast í heimbygdini hjá landsstýriskvinnuni, Sandavági.

Landsstýriskvinnan ætlar at brúka 16,2 milliónir til endamálið og fyri ta upphæddina væntar hon, at tey klára at byggja onkustaðni ímillum 10 og 16 íbúðir í Sandvági við teimum arbeiðsplássum, tað førir við sær.

Hon hevur longu skrivað eitt uppskot um hetta, sum hon ætlar at leggja fyri Løgtingið í næstu framtíð.

Hon sigur, at lógin verður í gildi í tvey ár og tískil skal málið verða avgreitt í seinasta lagi nýggjársaftan í 2013.

### Flytast úr Havn

Hetta er ein ætlan, sum tað annars alla tíðina hevur verið ætlanin at seta í verk í Havn.

Løgtingið hevur samtykt at hendan byggingin til sinnisveik skuldi vera í Havn.

Ætlanin var at byggja 16 íbúðir í tveimum byggistigum, har fyrra byggistig fevnir um 10 íbúðir, og seinna byggistig fevnir um seks íbúðir.

Men seinni varð ætlanin broytt til at tað skuldi byggjast eitt vanligt sambýli til sinnisveik ístaðin.

Eisini hendan lógin er galdandi í tvey ár og hon ferð sostatt úr gildi á nýggjárinum í ár, men enn er málið ikki avgreitt.

Men nú hevur landsstýriskvinnan so gjørt av at sleppa ætlanini at byggja í Havn og at flyta alla verkætlanina til Sandavágs, stendur í uppskotinum, hon ætlar at leggja fyri Løgtingið og sum Sosialurin hevur fingið fatur á.

Hon sigur, at málið um at byggja sambýli í Tórshavn til sinnisveik stavar heilt aftur frá aldarskiftinum, og fleiri ætlanir hava verið á borðinum, sum av ymiskum orsøkum ikki hava vunnið frama.

Hóast ætlanin síðani er broytt til at byggja sambýli ístaðin fyri íbúðir, hevur landsstýriskvinnan gjørt av at venda aftur til upprunaligaætlanina um at byggja íbúðir.

Samstundis verður ætlanin broytt.

Upprunaliga skuldi ætlanin bara fevna um íbúgvarnar á psykiatriska deplinum, men nú hevur Rósa Samuelsen gjørt av, at hon skal fevna um sinnisveik í síni heild.

Gongur, sum hon ætlar, skulu íbúðirnar í Sandavági byggjast næsta ár og í 2012.

*aki@sosialurin.fo*

**»** **Men nú hevur landsstýriskvinnan gjørt av at strika Havnina og at flyta alla verkætlanina til Sandavágs**
RÓSA SAMUELSEN

# FORKASTI




## FLYTA STOVNAR

*Nú verður aftur ein almennur stovnur, sum skuldi verða í Havn, fluttur út á bygd ístaðin. Og enn einaferð er tað ein politikari, sum flytur stovnin í sítt egna øki. Borgarstjórin í Havn vísir øllum atfinningum aftur*

**»** **Tað hevur gingið striltið at fáa byggiloyvi í Havn**
RÓSA SAMUELSEN

**LOKALPOLITIKKUR** – Borgarstjórin í Havn sigur, at framferðin hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum er forkastilig

Áki Bertholdsen

**»** **Fáa samgongufelagarnir hjá Rósu Samuelsen ikki eyguni upp fyri hesum, hava vit ein stóran trupulleika**
HEÐIN MORTENSEN

– Hetta er forkastiligt!

Tað er fyrsta viðmerkingin, sum kemur borgarstjóranum í Havn til hugs, tá ið vit fortelja honum, at ætlanin um at byggja íbúðir til sinnisveik í Havn nú er slept og at íbúðirnar skulu byggjast í Sandavági ístaðin.

Heðin Mortensen staðfestir, at tað kann ikki vera viðgerðin í Tórshavnar Býráði, sum er veruliga orsøkin til, at bygingin nú verður flutt til Sandavágs.

– Tað er forkastiligt, at hon enntá skrivar svart á hvítum í sjálvt lógaruppskotið, hon ætlar at leggja fyri Løgtingið í næstum, at Tórshavnar Býráð hevur sett so harðar treytir, at tað hevur forkomið ætlanini.

Rósa Samuelsen sigur annars, at Tórshavnar Kommuna setti so harðar treytir fyri at lata byggiloyvi, at tað hevði seinkað ætlanini munandi.

Hon sigur, at tað er orsøkin til, at hon nú sleppur ætlanini um at byggja íbúðir til sinnisveik í Havn, men flytir byggingina til Sandavágs ístaðin.

### Hoyrdu onki

Heðin Mortensen sigur, at seinastu ferð, Býráðið frætti frá Almannamálaráðnum var ein fundur, sum var ímillum partarnar 29. juni í ár.

– Á tí fundinum bað Almannamálaráðið okkum bíða við arbeiðnum at projektera atkomuvegir til stykkið, til Almannamálaráðið hevði viðgjørt spurningin innanhýsis. Tá ið tann viðgerðin hevði verið, skuldi Tórshavar Býráð frætta aftur frá Almannamálaráðnum, sigur Heðin Mortensen.

– Veruleikin er, at síð-